# Fleyr heldur áfram

*Flogbóltur: Enn einaferð eydnaðist Fleyr at vinna dyst, har teir ikki alla tíðina leiktu upp til sítt besta. Men teir taptu annan hálvleikin móti ÍF*

SVEINUR TRÓNDARSON

ÍF-Fleyr 1-2
(21-18, 11-21, 7-5
9-21, 8-21, 5-15)

Hóast tað var stórur stigamunur í teimum settunum, sum Fleyr vann, so eydnaðist tað kortini fuglfirðingum at vinna fyrra hálvleik. Tá samanumkom, var kortini einki at gera hjá fuglfirðingum, tí tá oddaliðið í meistaradeildini fekk ferð á spælið, var einki at gera hjá ÍF.

Sambært skránni átti dysturin millum ÍF og Fleyr at verið leiktur sunnudagin, men av ymsum orsøkum var hann fluttur til fríggjakvøldið ístaðin.

ÍF hevði undan dystinum bara tað eina stigi og tí var ikki væntað, at teir skuldu gera stórvegis um seg móti Fleyr, sum liggur klárt á odda í meistaradeildini.

Men, sum so ofta tá dystur er millum topp og botn, so tekur oddaliðið sær ov nógv av løttum, og tí endaði tað eisini við, at ÍF tók sær av fyrra hálvleiki, fyri nøsini á havnamonnum.

### Ikki heilt á berum

Sum kunnugt, so er tað ÍF, sum er meistari í løtuni, men av tí at teir hava mist nógv fólk, eru umstøðurnar hjá teimum ikki so góðar.

Kortini skal hetta ikki misskiljast, tí á liðnum eru fleiri leikarar, sum eru stak góðir flogbóltsleikarar. Trupulleikin er bara, at liðið er ikki spælt saman enn.

ÍF hevur m. a. við sigrinum á Mjølni fyrr í kappingarárinum víst, at teir kunnu taka stig frá teimum góðu liðunum, og tí skal einki lið taka sær av løttum. Serliga ikki tá spælt verður í høllini á Kambsdali.

Um Fleyr leikararnir høvdu gloymt hetta ella um tað var tí, at spælið ikki fekst at koyra í fyrsta setti skal vera ósagt, men endin var, at ÍF vann fyrsta sett 21-18.

Hvøkkurin hevur uttan iva gjørt sítt til, at Fleyr er vaknað við kaldan dreym, tí í øðrum setti smurdu teir ÍF av. Settið endaði við greiðum 21-11 sigri til Fleyr, og so mátti javnbrótari til.

Her var ÍF omaná, og tískil fóru teir til hávleik við leiðslu.

### Lótu aftur

Men tað var so at siga tað, sum var at síggja til ÍF. Aftan á steðgin kom Fleyr aftur sum eitt óløgið, og tað hevði við sær, at teir vunnu tey bæði næstu settini 21-9 og 21-9.

Í veruleikanum kann sigast, at hesi settini veruliga vísa munin, sum er á liðunum, tá Fleyr fær sítt spæl at ganga eftir vild, tí tá er spælið hjá teimum ein frægd fyri eyga.

Hinvegin hava teir í løtuni ein motivatiónstrupulleika av tí, at teir eru so langt frammanfyri hini liðini í deildini. Kortini eigur slíkt ikki at henda fyri eitt oddalið, sum í veruleikanum hevur framúr spælarar á hvørjum einasta plássi.

Eftir fjórða sett stóð á jøvnum og tí mátti seinasti javnbrótarin til fyri at finna eina avgerð, og heldur ikki her var nakar slingur í valsinum.

Fleyr vann ruddiliga 15-5 og harvið dystin 2-1.

Við sigrinum fór Fleyr seks stig fram um næsta liðið í deildini, sum er Fram. Teir liggja í løtuni við 6 stigum - ájavnir við Mjølnir, sum kortini hevur leikt ein dyst fleiri.



*Líkt er til, at hini liðini í fyrstu deild bert kunnu royna at verja fyri, tá Fleyr stendur hinu megin netið*

# Á slóðina

*Flogbóltur: Klaksvíkingar komu aftur á beint í dystinum móti SÍ sunnudagin. Teir vunnu 2-0 í einum lítið áhugaverdum dysti*

SVEINUR TRÓNDARSON

Mjølnir-SÍ 2-0

Mest positiva liðið í kappingini higartil í ár hevur verið SÍ. Eftir at hava hingið við einum ávísum likamsluti í vatnskorpuni í fjør, gjørdu teir bart næstan frá byrjan í ár, og ta einu tíðina vóru teir enntá nummar tvey í kappingini.

So kom stígur í, og síðani hava ungu sørvingarnir havt ilt við rættuliga at fóta sær ímóti ovaru liðunum.

Seinasta vikuskiftið, tá teir vóru í Havn og leiktu móti Fleyr, vunnu teir fyrra hálvleik, og tí var kanska væntandi, at teir fóru at gera eitt sindur um seg í dystinum móti Mjølnir, sum varð leiktur sunnudagin.

Men so var ikki, tí Mjølnir vann greiðan 2-0 sigur.

### Løgdu sjógv ímillum

Hóast tað ikki hevur gingið eftir vild hjá Mjølnir í ár, og heldur ikki eftir at teir hava fingið jugoslaviskan leikandi venjara, so var eingin ivi um, at klaksvíkingar høvdu sett sær fyri at henda dystin skuldu teir vinna.

Teir løgdu sjógv millum seg og SÍ í byrjanini av hvørjum einasta setti, og eftir tað ráddi bara um at halda fast.

Hetta gjørdu teir á besta hátt, og tískil varð ongantíð talan um ein spennandi dyst.

Sum dysturin leið, minti tað mest um eina avgreiðslusøk, tí ungu sørvingarnir fótaðu sær als ikki móti klaksvíkingum, sum stýrdu øllum.

Úrslitið hevði við sær, at Mjølnir nú er ájavnt í stigum við Fram, men kortini fyri ein dyst fleiri enn havnarmenninir. Um tað so eisini hevur við sær, at Mjølnir gerst nummar trý og Fram nummar tvey í kappingini, kunnu vit bara gita um. Liðini hava ein sínamillum dyst eftir, og hann verður í Klaksvík.

# Eingin tekur Mjølnir

*Flogbóltur: Eingin klárar at gera nakað sum helst við Mjølnir, sum tykist at vera fleiri longdir frammanfyri hini liðini í bestu flogbóltsdeildini*

SVEINUR TRÓNDARSON

ÍF-Mjølnir 0-2
(17-21, 15-21
11-21, 5-21)

Úrslitið av dystinum millum niðasta og ovasta liðið í meistaradeildini hjá kvinnum gjørdist beint sum væntað.

Mjølnir vann ruddiligan 2-0 sigur og tað var ongantíð upp á tal, at sigurin var í vanda.

Í fyrra hálvleiki fekk ÍF ávikavist 17 og 15 stig, men tað var kortini ikki upp á tal, at tær komu klaksvíkskvinnum upp til kníggja.

### Fleiri longdir frammanfyri

Sum kappingin hevur gingið higartil í ár, er tað eingin, sum hevur kunnað gjørt nakað sum helst við Mjølnir.

Gamaní, tær hava tapt ein dyst, men tann dystin snávaðu tær og síðani eru tær farnar frá sigri til sigur.

Tí kann kanska setast spurnartekin við støðuna hjá kvinnuflogbóltinum í Føroyum.

Vit vita, at føroyska landsliðið er Oyggjaleikameistari, men tað er so langt frá nakað, sum sæst aftur í heimligu kappingini. Ikki tí, liðini vísa vilja, men tíverri mugu vit staðfesta, at støði er ikki tað, tað hevur verið í meistaradeildini hjá kvinnum.

Í veruleikanum er tað ein stórur spurningur, um Mjølnir yvirhøvur fær nakað sum helst burtur úr at spæla í landskappingini, so stórur er munurin.

### Einki stuttligt at fáa bank

Hesi orðini, sum standa beint omanfyri, skulu ikki misskiljast, tí tað sigur seg sjálvt, at tað ongantíð er stuttligt at tapa. Men tað sum býr undir er, at tað als ikki er stuttligt at spæla, tá ein bókstaviliga verður hølvaður ígjøgnum.

Tað er støðan í løtuni, tá kvinnurnar hjá Mjølni standa øðrumegin netið - og so kann tað gera tað sama, at eitt nú fuglfjarðakvinnur gera sítt ítarsta. Tað er verri enn so nóg mikið til bara at hótta Mjølnir eitt lítið sindur.

Tað er bara at vóna, at tað kemur eitt sindur meira av »futti« í hini liðini, soleiðis at vit í framtíðini aftur fara at síggja eina spennandi kapping.

ÍF hevur í ár roynt sítt og tað hava tær gjørt hóast útgangsstøði ikki var serliga gott at byrja við.

# Dráttur vann aftur á Fleyr

*Flogbóltur: Tað gongur av skriðuni hjá Fleyrkvinnunum, sum hetta vikuskiftið leiktu á heimavølli móti Drátti. Vágakvinnur vunnu dystin 2-0*

SVEINUR TRÓNDARSON

Fleyr-Dráttur 0-2
(13-21, 15-21
21-13, 18-21, 5-7)

Eftir at hava havt trupulleikar at manna lið móti TB vikuskiftið undan hesum, bar aftur til at manna kvinnuliðið hjá Fleyr til dystin móti Drátti.

Seinast hesi liðini leiktu móti hvørjum øðrum í Havn vann Dráttur dystin, og tískil átti Fleyr hevnd tilgóðar.

Men lítið hjálpti. Dráttur endurtók meistarastykkið frá seinast og vann ein greiðan 2-0 sigur tá til stykkis kom.

### Lítið fantilsi í

Tað man vera meiri enn óhugaligt at vera partur av Fleyrliðnum í løtuni, tí tað gongur alt av skriðuni. Eingin ivi er um, at leikararnir royna at gera sítt ítarsta fyri at fáa vent gongdini, men tað tykist sum er alt runnið í stein.

Tapa dystir á heimavølli, sum tær eins væl kundu vunnið, og tá dystirnir á útvølli eru javnir, koppar tað eisini í fleiri førum øvugtan veg.

Tá so er, skal lítið til at leikararnir missa móti, og nú sjúka og annað forfall eisini hevur spælt inn, er lítið gott eftir.

Úrslitið av dystinum sunnudagin hevur við sær, at Fleyr eftir øllum at døma skal avskrivast sum heiðursmerkjalið, hóast tað bara er tað eina stigið upp til TB. Tvørágentur hava nevniliga leikt ein dyst færri enn Fleyr, og tískil kann munurin saktans gerast trý stig eftir einum dysti.

Hinvegin skulu havnarkvinnurnar nú til at hyggja niðureftir. ÍF, sum er einasta liðið, sum er aftanfyri Fleyr, hevur nevniliga 1 stig færri enn Fleyr, fyri líka nógvar dystir.

Tí mugu vit staðfesta at Fleyr, fyri fystu ferð í nógv, nógv harrans ár, er botnlið í meistaradeildini hjá kvinnum.

### Dráttur er omaná

Hinvegin sær alsamt bjartari út hjá Drátti. Seinastu árini hava tær havt trupulleika at vinna teir torføru útidystirnar, men sigrar sum hesir, skulu uttan iva geva teimum blóð á tonna.

Við sigrinum sunnudagin eru vágagenturnar nummar tvey við seks stigum, men tær hava leikt tveir dystir fleiri enn TB, sum er tvey stig aftanfyri.

Hvussu leikur ferð millum hesi bæði liðini, mugu vit bíða eftir at síggja, men vit kunnu nú av álvara ganga út frá, at tað verða hesi bæði liðini, sum fara at kappast um annað- og triðjaplássi í meistaradeildini hjá kvinnum í ár.



# Flogbóltskapping í Klaksvík

*Vegna plásstrot var ikki rúmd fyri øllum liðmyndunum, tá vit í blaðnum í gjár høvdu frásøgn um flogbóltskappingina, Gullkonto Cup 2000, sum varð hildin í Klaksvík um vikuskifti.*

JÁKUP MØRK
MYNDIR: SÁH & JP

Sum nevnt í blaðnum í gjár, so var stór flogbóltskapping fyriskipað í Klaksvík um vikuskiftið.

Tilsamans høvdu 75 lið boðað frá luttøku, og hóast onkur teirra noyddist avstað í úrtíð, til tess at náa ferðasambandið heim aftur, so vórðu flestu dystirnir avgreiddir í øllum góðum

Til tess at avgreiða allar dystirnar, gjørdist neyðugt at nýta heili fýra leikstøð, og vórðu dystir sostatt leiktir í KÍ-høllini umframt skúlunum á Ziskatrøð, Fossanesi og Viðareiði.

Plásstrot var í blaðnum í gjár, og tískil var tað ikki gjørligt at hava myndir av vinnandi liðunum í tí blaðnum, men beur seint enn ongantíð, sum orðafellið sigur..



*Fleyr a og b skuldi avgera finaluna hjá yngstu gentunum*



*TB a vann kappingina fyri gentur 12 ár*



*Sí var besta liðið í bólkinum, dreingir 12*



*TB vann kappingina í yngsta dreingjabólkinum*



*Í bólkinum, gentur 14, vann SÍ*



*Fleyr vann bólkin, dreingir 14*



*Vinnari í dreingir 16 gjørdist Fram*



*KÍF varð besta liðið í gentur 16*



*TB vann hjá kvinnuunglingum*



*Fram vann eisini kappingina fyri mansunglingar*